## Mentamálaráðið
*Fólkaskúladeildin*

# Fyribilsstarv sum varaskúlastjóri

### í Tórshavnar kommunuskúla

Ì sambandi við at annar varaskúlastjórin fer í farloyvi, verður starvið sum varaskúlastjóri í Tórshavnar Kommunuskúla lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. januar 2006 til 31. juli 2007.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Víst verður annars til nærri lýsing av starvinum á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum **www.mmr.fo**

Umsóknirnar skulu vera Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 20. desember 2005.** Umsóknarblað liggur á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Um tú ynskir fleir upplýsingar um starvið kanst tú ringja til Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Tórshavn, 30. november 2005
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · 110 Tórshavn
Tlf. 355050 · Fax 355055 · e-postur: MMR@MMR.FO

## Skrivstovulærlingur

**Vit sóknast eftir lærlingi innan fyrisiting til skrivstovu okkara.**

**Umsøkjarin skal:**
hava góð samstarvsevnir
hava teldukunnleika
verða nærlagdur og røkin
verða væl fyri í enskum máli
verða skrivliga væl fyri á føroyskum

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sue Philbrow tlf. 422503 ella e-mail: sue@thor.fo

Umsóknin saman við avritum av prógvum og møguligum ummæli verður at senda til:

**P/F THOR**
Bryggjan 5
420 Hósvík

THOR

Umsóknin skal verða okkum í hendi, seinasta lagi 28.12.2005.

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

## Fíggjarmálaráðið

# Fíggjarmálaráðið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum søkja eftir fulltrúum

**Arbeiðið í Fíggjarmálaráðnum**
Arbeiðið í Fíggjarmálaráðnum fevnir um ráðgevandi, fyrisitingarligar og analytiskar uppgávur á teimum økjum, ið ráðið umsitur, t.e. at:
- Ráðgeva landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta-, avgjalds-, og kapitalmarknaðarmál og viðgera innkomin mál
- Fyrireika uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- Loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Gera analysur, langtíðarætlanir og tryggja, at hesar verða framdar
- Ráðgeva og leiðbeina stjórnarráðum og stovnum.

**Arbeiðið á Lønardeildini**
Arbeiðið á Lønardeildini fevnir í høvuðsheitum um sáttmálasamráðingar, málsviðgerð og ráðgeving í arbeiðsrættarligum og setanarrættarligum spurningum, t.e. at:
- Ráðgeva stjórnarráðum, kommunum, stovnum og feløgum og avgreiða fyrispurningar frá teimum
- Gera vegleiðingar og rundskriv um lønar- og setanarviðurskifti
- Tulka lógir, avtalur og tænastumannalóggávuna.
- Svar spurningum í fyrisitingarrætti og arbeiðsmarknaðarlóggávu
- Gera sáttmálaar við fakfeløg

**Førleiki**
Vit vænta, at umsøkjarar hava útbúgving av hægri lærustovni, eitt nú cand. jur., cand. merc., cand. polit. ella líknandi. Aðrar útbúgvingar saman við hóskandi royndum kunnu eisini koma upp á tal. Vit rokna eisini við, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva í arbeiðsbólkum.

**Setanartreytir**
Setanartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

**Vit bjóða**
- Arbeiði á høgum fakligum stigi, og tí eru góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- Sjálvstøðugt starv, sum tú í stóran mun skapar sjálv/ur
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Starv, sum til tíðir kann vera krevjandi, men sum samstundis er áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Fíggjarmálaráðið**
Postboks 2039
FO-165 Argir

Frestin at søkja er hósdagin ***5. januar 2006 kl. 12.00.***
Størvini verða sett skjótast tilber.

Vilt tú vita meira um størvini, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf. 35 20 20 ella Snorra Fjallsbak, stjóra á Lønardeildini á tlf. 35 22 00.

# Venjingarskúlin

Søkt verður eftir stuðulsfólki til næming í 3. flokki við serligum tørvi. Talan er um 17 tímar um vikuna.

Løn eftir sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Fyrimun hava umsøkjarar við pedagogútbúgving og/ella royndum í mennandi stuðulsarbeiði.

Umsóknin við avriti av møguligum próvskjølum/viðmælum má vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 5. januar 2006.

Meira fæst at vita við at seta seg í samband við skúlastjóran (316317/213502).

**Skúlastýrið við Venjingarskúlan**
**Blankagøta 10**
**100 Tórshavn**

# Kommunustýrisfundir 2006

Bygdaráðið hevur á fundi tann 12. desember 2005 samtykt at áseta almennu fundirnar hesar dagar:

| | | |
|---|---|---|
| Mánadagin | 30. januar | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 27. februar | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 27. mars | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 24. apríl | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 29. mai | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 26. juni | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 28. august | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 25. september | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 30. oktober | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 13. november | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 27. november | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 18. desember | kl. 19.00 |

**Sunda Kommuna**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin